## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tjóðpallur Føroya:

# Dreymurin gjørdist veruleiki

**Umleið 150 fólk vóru komin saman til móttøku á gamla Meiarínum í Havn fríggjadagin 13. mai 2005, í sambandi við at Tjóðpallur Føroya alment varð tikin í nýtslu**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Ætlanirnar um ein føroyskan tjóðpall eru gamlar, men í 2000 vórðu Eyðun Johannessen og Jenny C. Petersen sett av Leikpalli Føroya at fyrireika arbeiðið við at seta Tjóðpall Føroya á stovn.

Tey sum hildu røðu undir móttøkuni seinasta fríggjadag vóru: Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, Eyðun Johannessen, leikstjóri, Páll Danielsen, formaður í Leikarafelag Føroya, Jenny C. Petersen, stjóri á Tjóðpalli Føroya, og Laura Joensen, sjónleikari, læs eina søgu eftir H.C. Andersen.

Nú stovnurin er farin at virka, er Jenny C. Petersen sett sum stjóri á Tjóðpalli Føroya.

Fyrsti leikurin, sum varð framførdur á Tjóðpalli Føroya, var leikurin »Momo«, sum tey vóru byrjaði upp á, áðrenn Tjóðpallur Føroya tók yvir. Í løtuni venja tey íslendska leikin »Cellofan«, eftir tað verður ein leikur gjørdur í samstarvi við Tórshavnar Musikkskúla og Norðurlandahúsið. Næsta ár verður fyrsta føroyska operain framførd í samstarvi við tónleikarabólkin Aldubáruna.

Við Tjóðpalli Føroya gjørdist dreymurin hjá føroysku leiklistafólkunum veruleiki, sigur stjórin Jenny C. Petersen



*Formaðurin í Leiklistaráðnum Annika Sølvará og stjórin á Tjóðpalli Føroya Jenny C. Petersen*



*Hjúnini Jenny og Kári Petersen. Kári hevur í mong ár verið virkin sum áhugasjónleikari*



*F.v.: Ria Tórgarð, sjónleikari, Karin Kjølbro, Ørvur Thomassen, og Jógvan E. Ósá, nevndarlimur í Meginfelag áhugaleikara Føroya*



*Mentamálaráðharrin Jógvan á Lakjuni handar her Eyðuni Johannesen ein málning sum gávu frá Mentamálráðnum*



*Laura Joensen, sjónleikari, og Jóannes Andreasen*



*Eyðun Johannessen fær her blómur frá formanninum í Leiklistaráðnum, Anniku Sølvará. Eyðun er ein av teimum, sum miðvíst hevur arbeitt fyri at Tjóðpallur Føroya gjørdist veruleiki*